# Sosialurin við í Buzz Aldrin

**Sum lesarin helst hevur varnast, eru fýra øðrvísi síður prentaðar í Sosialinum í dag. Tær skulu brúkast í filminum Buzz Aldrin, sum verður upptikin í Føroyum í hesum døgum.**

**MENTAN**

*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Sum flestum kunnugt, hava vit nú í eina tíð havt vitjan av einum stórum norskum filmsliði, sum tekur upp filmin Buzz Aldrin.

Einastaðni mitt í filminum kemur hin lítilláttni høvuðspersónurin, Buzz Aldrin, í klørnar á einum ágangandi journalisti frá Sosialinum. Hesin vil skriva eina grein um norðmannin, sum als ikki er sinnaður at luttaka. Kortini endar hann á forsíðuni á blaðnum, og inni í blaðnum stendur stór grein at lesa um hann.

Hetta er orsøkin til, at lesarar hjá Sosialinum í dag finna fýra øðrvísi síður um Buzz Aldrin inni í blaðnum. Herfyri heitti filmsliðið á okkum, um at hjálpa teimum við at prenta blaðið, sum skal vera við í filminum. Sjálvandi vildu vit gjarna stuðla hesari frálíku verkætlan, sum uttan iva setir Føroyar á heimskortið.

At blaðið, við tí sermerkta navninum "Sosialurin" eisini verður sjónligt úti um landoddarnar, kemur bara okkum til góðar. Eisini um fólk í útlondum flenna eftir tí :-)

Filmurin, Buzz Aldrin, er bygdur á stóru skaldsøguna hjá Johan Harstads. Bókin hevur fingið framúr góð ummæli og er longu týdd til fleiri enn tíggju mál.

Sjónleikarin, Annfinnur Heinesen og Annika Johannesen eru millum føroysku leikararnar, ið hava fingið stóru leiklutirnar. Danin, Bjarne Henriksen, sum var pápi myrdu gentuni í røðini, Forbrydelsen og úr Noregi kemur høvuðspersónurin, Pal Sverre Hagen.

Filmsliðið hevur longu verið í Føroyum í fleiri vikur, og ætlanin er, at upptøkurnar skulu verða lidnar fyrst í august. Síðan verður hildið fram í Noregi. Verkætlanin er mett at kosta 37 milliónir krónur, og verður filmurin væntandi klárur á heysti 2010. Filmurin, sum verður sýndur sum sjónvarpsrøð í fýra pørtum, er longu seldur norðurlendsku sjónvarpsrásunum.


Guds gartnari úr at gera

Sosialurin

Nr. 126 • týsdagur • 6. juli 2000 • 74. árgangur • Kr. 10,00

ÚTSØLA

Fer um tvær vikur

Nýggjur barnagarður

Genialur gartnari á eftirviðgerðarstovni fyri sálarsjuk

www.sosialurin.fo

*Miðjan á Sosialinum í dag er rekvisitt til filmin um Buzz Aldrin. Forsíðan og opnan í miðjuni koma fyri í norsku sjónvarpsframleiðsluni, sum verður sýnd í fýra pørtum á heysti í 2010.*

## VEÐRIÐ


Petur Skeel Jacobsen greiðir frá um veðrið




**Veðrið í morgin:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 12 og 15 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Fleyr til gul av landnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørkaflókar. Hitin millum 13 og 16 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi, um kvøldið upp í ein strúk. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 12 og 15 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 12 og 16 stig.

*Juni var bæði turrur í lýggjur. Avfallið var bert 17mm ímóti 66mm, sum er miðal yvir 30 ár. Miðalhitin var 9,9°c ímóti 9.0°c yvir 30 ár.*

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 7 |
| Nuuk | 10 |
| Qaqortoq | 4 |
| Ammassalik | 5 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 15 |
| Seyðisfjørður | 8 |
| Tórshavn | 11 |
| Lerwick | 13 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 19 |
| Tromsø | -- |
| Bergen | 20 |
| Oslo | - |
| Stokkhólm | 16 |
| Keypmannah. | 25 |
| Helsinki | 17 |
| Moskva | 16 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 25 |
| Bukarest | 28 |
| Paris | 23 |
| Madrid | 29 |
| Róm | 28 |
| Malorca | 31 |
| Athen | 30 |
| Malta | 33 |
| Tunis | 32 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 39 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 13 |
| New York | 27 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | -- |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 11 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 16 |

## LUFTTRÝSTIÐ

Síðstu nátt:




Komandi nátt:




**Síðstu nátt:**
Eitt lágtrýst, 1004 hPa. í landsynning úr Føroyum fer spakuliga í útnyrðing.

**Komandi nátt:**
Lágtrýstið skamt vestan fyri Føroyar grynnist. Hátrýstið yvir Grønlandi stendur mestsum í stað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/07 kl. 06⁰⁰ – 07/07 06⁰⁰. Hitin í gjár: 10,6°
Minsti hiti máldur í juli: +0,4° - Mesti hiti máldur í juli: 20,2°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 06/07 kl. 06⁰⁰ – 07/07 06⁰⁰.
Avfallið higartil í juli: 2 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

7. juli — Mánin longst frá jørini
15. juli — Seinna kvarter
21. juli — Mánin næstur jørðini

Kelda. Álmanakkin 2008

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 15. juli | 00:38 | 13:12 | - | 12:12 | - | 12:27 | 02:38 | 15:12 | 03:38 | 16:12 | 11:26 | - | 10:26 | 23:02 | 00:53 | 13:27 | 01:53 | 14:27 | 00:23 | 12:57 | 01:38 | 14:12 |
| 16. juli | 01:47 | 14:22 | 00:47 | 13:22 | 01:02 | 13:37 | 03:47 | 16:22 | 04:47 | 17:22 | 00:02 | 12:37 | 11:37 | - | 02:02 | 14:37 | 03:02 | 15:37 | 01:32 | 14:07 | 02:47 | 15:22 |
| 17. juli | 02:46 | 15:11 | 01:46 | 14:11 | 02:01 | 14:26 | 04:46 | 17:11 | 05:46 | 18:11 | 01:01 | 13:26 | 00:01 | 12:26 | 03:01 | 15:26 | 04:01 | 16:26 | 02:31 | 14:56 | 03:46 | 16:11 |
| 18. juli | 03:38 | 16:05 | 02:38 | 15:05 | 02:53 | 15:20 | 05:38 | 18:05 | 06:38 | 19:05 | 01:53 | 14:20 | 00:53 | 13:20 | 03:53 | 16:20 | 04:53 | 17:20 | 03:23 | 15:50 | 04:38 | 17:05 |
| 19. juli | 04:34 | 17:03 | 03:34 | 16:03 | 03:49 | 16:18 | 06:34 | 19:03 | 07:34 | 20:03 | 02:49 | 15:18 | 01:49 | 14:18 | 04:49 | 17:18 | 05:49 | 18:18 | 04:19 | 16:48 | 05:34 | 18:03 |


Forelskað?
Vís tað í Sosialinum

javni
– Virkin og virðismikil
www.javni.fo